Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Eirikur í Jákupsstovu, løgtingsmaður

Svarari: Ruth Vang, landsstýriskvinna í fíggjarmálum

Evni: Landafrøðiligt býti av øktum rakstrarútreiðslum

Spurningar:

1. Hvussu nógv er raksturin á landsins fíggjarlóg við staðseting í høvuðsstaðnum samanborið við restina av landinum í krónum og prosentum í tíðarskeiðnum 2012-2022?

Viðmerkingar:
Ein munandi rakstrarvøkstur er farin fram á fíggjarlógini síðan fíggjarkreppuna fyri góðum 10 árum síðan.
Hetta er bæði komið av øktum virksemi/tænastum hjá landinum, og av øktum lønarkostnaðum og øðrum.
Tað vísa seg at vera ymiskar fatanir millum fólk av, hvar hesin vøksur er farin fram.
Ofta verður av summum ført fram, at tað almenna í Havn veksur nógv skjótast, og tí er mest upplagt at halda aftur í útreiðslunum har, meðan nøkur føra fram, at støðan er beint mótsatt og at útreiðslurnar kring landið vaksa mest.
Hesin spurningur er ætlaður fyri at fáa greiðu á, hvussu veruliga støðan er.

Á Løgtingi, 6. september 2023

Eirikur í Jákupsstovu